# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Oljan í Miðeystri hevur so stóran týdning fyri USA, at landið kann ikki taka seg úr Irak*

*(bretsk frágreiðing)*

# 320 palestinar deyðir



*Aftur í morgun skutu ísraelskir stríðsvognar eftir støðum í Gaza, haðani hendan myndin er. Umleið 320 palestinar hava latið lív, síðani ísraelski herurin fór undir tey seinastu átøkini í Gaza. Umleið helmingurin av teimum eru sivilfólk.*

# Kríggið ímóti yvirgangi kann vara í 30 ár

**Oljan í Miðeystri ger, at amerikanararnir kunnu ikki taka seg úr Irak, siga bretskir serfrøðingar**

Sambært The Oxford Research Group er einki, sum bendir á, at kríggið ímóti yvirgangi fer at enda enn á sinni, og stovnurin væntar ikki, at USA fer at broyta sín politikk í Irak og Afghanistan stórvegis, sjálvt um demokratarnir hava fingið meirilutan í Kongressini.

The Oxford Research Group sigur, at USA er í einari tvístøðu í Irak. Verða teir amerikonsku hermenninir tiknir haðani, fáa hernaðarligir bólkar leysar teymar í tí týdningarmikla oljulandinum. Verða teir amerikonsku hermenninir hinvegin verandi í Irak, fara teir at virka sum ein magnetur, sum dregur víðgongdar bólkar til sín.

Tað er Paul Rogers, professari á lærda háskúlanum í Bradford, sum hevur orðað frágreiðingina hjá The Oxford Research Group. Hann sigur við blaðið The Guardian, at tann nógva oljan í londunum við Persaflógvan fer at hava alstóran týdning fyri USA og Kina í framtíðini, og at bæði londini tí hava áhuga í viðurskiftunum har. Tí er tað heilt óhugsandi, at USA fer at taka seg úr økinum, sigur Paul Rogers. Hann væntar ikki, at amerikanararnir fara at broyta Irak-politikkin stórvegis, tá saman um kemur.

– Tað grundleggjandi mistakið var, at stýrið hjá Saddam Hussein bleiv rikið frá við hermegi. Avgerðin at senda 150.000 amerikanskar hermenn inn í sjálvt hjartað í tí arabiska heiminum var ein gáva til felagsskapir og bólkar sum al-Qaeda, og hetta hevur borið í sær, at í øllum økinum verður amerikanska hermegin roknað sum hersetingarvald, sigur Paul Rogers við The Guardian.

# Smugglaðu rúsevni í sjáldsomum kavbáti

**Amerikanska sjóverjan gjørdi kvetti, tá hon fekk eyga á eitt løgið far**

Tað løgna farið var gjørt úr trimum rørum, men tá sjóverjuskipið nærkaðist tí uttan fyri strondina í Costa Rica, kavaði tað. Tað eydnaðist kortini sjóverjuskipinum at finna farið aftur, og einar tveir favnar undir vatnskorpuni komu kavararnir fram á ein heimagjørdan kavbát, sum kortini ikki líktist nøkrum øðrum kavbátaslagi.

Báturin var gjørdur úr glastrevju og viði, og hann hevði siglt einar 125 fjórðingar úr Kolombia á veg til USA, tá sjóverjan kom fram á hann. Hann gekk einar sjey míl.

Tá amerikonsku sjóverjumenninir fóru umborð á kavbátin, vísti tað seg, at hann var stúgvandi fullur av rúsevninum kokain. Lastin vigaði hálvt fjórða tons, og teir fýra menninir, sum vóru við bátinum, vórðu alt fyri eitt tiknir og skuldsettir fyri rúsevnasmugling. Tann sjáldsami kavbáturin varð togaður til Costa Rica.

Amerikanska sjóverjan er regluliga á varðhaldi úti fyri strondini í Costa Rica, og higartil í ár hava sjóverjan og myndugleikarnir í Costa Rica lagt hald á 18 tons av kokaini.




*Mangt verður brúkt til at smugla rúsevni við. Hesin kavbáturin er so tað seinasta*

## STUTT SAGT

### Aftur vinir

Iran og Sýrialand hava gjørt av at knýta tað diplomatiska sambandið aftur, eftir at londini ikki hava havt slíkt samband síðani 1982. Hóast Baathflokkurin hevur sitið við ræðið í báðum londunum, hava viðurskiftini teirra millum verið kaldlig líka síðani í sjeytiárunum. Undir krígnum millum Irak og Iran í áttatiárunum var Sýrialand í parti við Iran, og táverandi sýriski forsetin, Hafiz al-Assad, tók undir við innrásini í Irak í 1991. Í síðstu viku var sýriski uttanríkisráðharrin í Bagdad, og í gjár varð so boðað frá, at londini knýta tað diplomatiska sambandið aftur.

### Skal útflýggjast

Myndugleikarnir í Kroatia krevja, at norsku myndugleikarnir skulu útflýggja ein 43 ára gamlan kroata, sum situr í varðhaldi í Oslo. Damir Sireta kom til Noregs í 1998, men tvey ár seinni fekk hann 12 ára fongsulsdóm í Kroatia fyri at hava beint fyri 200 kroatiskum krígsfangum í 1991. Í heyst bóðu kroatisku myndugleikarnir um at fáa hann útflýggjaðan úr Noregi, og 6. oktober bleiv maðurin tikin í Oslo og settur í varðhald, meðan málið verður kannað.

### Kongur í rættin

Í Nepal krevur ein almenn nevnd, at Gyanendra kongur verður stevndur fyri rættin, tí hann gav trygdardeildunum boð um at skjóta eftir mótmælisfólki í apríl í ár. Minst 22 fólk lógu eftirá, og uppaftur nógv fleiri vórðu særd. Nevndin sigur, at meiri enn 200 politikarar og embætismenn eru samsekir. Stjórnin hevur lovað at fylgja tilmælinum hjá nevndini, men eygleiðarar vænta ikki, at kongur verður drigin fyri rættin.